# Vilja hava betri trygdarnet undir arbeiðsfólkið

**– Tað kemur ferð eftir ferð fyri, at arbeiðsfólk koma í klemmu og tað má Løgtingið broyta, sigur Føroya Arbeiðarafelag**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*



*Arbeiðsfólk eru alt ov illa tryggjað, tá ið virkið, tey arbeiða á, fer á húsagang. Í nógvum førum detta tey niðurímillum tvær skipanir, sum júst eru gjørdar fyri at tryggjað, at tey ikki skulu koma í fíggjarligt óføri*

– Trygdargrunnurin er ikki nóg góður. Og tað má Løgtingið bøta um.

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, varð tann almenni Trygdargrunnurin til umrøðu.

– Tað var ein vanlukka, tá ið løgtingið fyri nøkrum árum síðani broytti Trygdargrunnin, sum skal tryggja løntakarum løn, tá ið virkið tey arbeiða á, fóru á húsagang, segði Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon segði, at áður var tað so, at tá ið virki fóru á húsagang, fingu verkfafólk eisini løn í uppsagnartíðini og tilsamans kundu teir fáa upp í 70.000 krónur úr grunninum.

Men tíverri hendi tað, at arbeiðsgevarar fóru at gera sær dælt av hesum við tað, at teir høvdu virki gangandi, eftir at tey í veruleikanum vóru farin á heysin, tí teir vitstu, at Trygdargrunnurin tók um endan og betalti arbeiðsfólkinum løn.

– Tað endaði við, at grunnurin varð tømdur, tí fyrst í nítiárunum vóru ógvuliga nógvir húsagangir. Sostatt broytti Løgtingið grunnin so at hann nú ikki longur letur løn í uppsagnartíðini og í mesta lagi kunnu arbeiðsfólk 20.000 krónur úr grunninum.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta gjørdi støðuna hjá verkafólki nógv verri.

Tað vóru hvalbingar, sum reisti málið á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag og teir hava merkt á sínum egna kroppi, hvussu vánalig skipanin er nú.

– Tá ið flakavirkið í Halba fór á húsagang seinast, vóru tað nógv arbeiðsfólk, sum mistu túsundtals krónur.

– Orsøkin er, at, at Trygdargrunnurin letur ikki løn í uppsagnartíðini. Men tey kundu heldur ikki fáa nakað úr ALS, tí Arbeiðsloysisskipanin letur heldur onki í eini uppagnartíð.

Sostatt duttu tey niður ímillum tvær skipanir, sum júst eru gjørdar fyri at tryggja arbeiðsfólki ímóti at koma í fíggjarligt óføri í sambandi við húsagang og arbeiðsloysi.

Ingeborg Vinther sigur, at Føryoa Arbeiðarafelag fer tískil at heita á politisku myndugleikarnar um at broyta Trygdargrunnin aftur, so at hann aftur tryggjar fólkið løn í uppsagnartíðini, tá ið eitt virkið fær á húsagang.

– Hetta má Løgtingið gera fyri at tryggja, at arbeiðsfólk ikki skulu detta niður ímillum tær báðar trygdarskipanirnar og koma liggja við ongari krónu í upp til tríggjar vikur, tá ið virki teirra fer á húsagang.

Upplýst var, at hetta kundi ikki vera ein fíggjarligur spurningur hjá grunninum, tí Landsstýrið hevur avtikið gjaldið í grunnin, so nógvur peningur er í honum.

# Styrkja seg til at fara í verkfall

**Føroya Arbeiðarafelag vónar ikki, at sáttmálasamráðingarnar hesuferð fara at føra til verkfall. Men fyri at bøta um heilan fingur, ætlar felagið seg styrkja seg, verður tað neyðugt at fara í verkfall**

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*



*Verður neyðugt at fara í verkfall hesuferð, skulu verkfallsvaktirnar hjá Føroya Arbeiðarafelag faa hægri samsýning, enn tær fingu seinast*

Føroya Arbeiðarafelag hevur nú aftur tikið stig til at styrkja seg, verður tað neyðugt at fara í verkfall.

Samráðingar um nýggjan sáttmála verða í næsta mánað, men Ingeborg Vinther leggur dent á, at hon vónar ikki, at tað verður neyðugt at fara í verkfall fyri at fáa nýggjan sáttmála.

– Men verður tað neyðugt, mugu vit eisini vera til reiðar at fara í verkfall. Men grundarlagið fyri at fara í verkfall má eisini vera til staðar og tí er tað alneyðugt, at vit vit styrkja verkfallsgrunnarnar hjá felagnum so nógv, at vit kunnu fara í verkfall, uttan ov stóran fíggjarligan miss fyri limirnar, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at á aðalfundinum í ár var tískil aftur gjørt av at styrkja verkfallsgrunnin.

Hvussu nógv verkfallsgrunnurin verður styrkur við, vil hon ikki upplýsa og hon vil heldur onki siga um, hvussu stórir verkfallsgrunnarnir eru.

Eitt nú samtykti aðalfundurin at hækka limagjaldið 15 krónur um árið fyri hvønn lim í felagnum. Limagjaldið hevur verið 10 krónur um árið fyri hvønn lim, umframt ein prosentpartur av lønini, men tað fasta gjaldið er nú hækkað upp í 25 krónur fyri hvønn lim.

## Hugaligari

Men samstundis ætlar Føroya Arbeiðarafelag eisini at gera tað hugaligari at taka lut í ymsum arbeiði fyri felagið, tá ið verkfall er, eitt nú at standa verkfallsvakt.

– Tað skerst ikki burtur tað hevur verið ein fíggjarligur missury fyri limirnar at vera í verkfalli.

Men limirnir, sum hava staðið verkfallsvakt, hava fingið eina ávísa samsýning fyri tað.

Men Ingeborg Vinther sigur, at verður verkfall hesuferð, fer hendan samsýningin til verkfallsvaktirnar at verða hækkað nokk so fitt.

– Føroya Arbeiðarafelag er væl fyri fíggjarliga, so vit hava ráð til at lata limunum størri samsýning og tað fara vit at gera, sigur Ingeborg Vinther.

## Ongi undantøk

Annars leggur ingeborg Vinther dent á, at verður verkfall, skal verkfall vera og tað merkir, at undantøk verða ikki givin , uttan har sum lív og heilsa er í vága. Tað hevur annars fleiri ferðir verið frammi um at alivinnan skal hava undantaksloyvi, tá ið verkfall er, so at arbeiðið har ikki verður lagt lamið. Tað standa so stór virði í alivinnuni, at arbeiðsgevarar meta, at tað er ábyrgdarleyst at hon eisini skal vera umfatað av verkfalli, tí tá er vandi fyri at stór, samfelagslig virði fara fyri skeytið.

Men Ingeborg Vinther vísir á, at verkfall er tað síðsta vápnið hjá fakfeløgunum.

– Men tað er bara eitt sterkt vápn, tá ið tað verður hildið yvir alla linjuna. Fara vit at geva undantøk her og har, er so ómetaliga skjótt, at verkfallið verður útholað og so hevur tað onga ávirkan, sigur Ingeborg Vinther.

Tí legði hon enn einaferð dent á, at verður verkfall, er útgangsstøðið, at onki undantak verður giviðm hvørki til alivinnu ella nakað annað, uttan har sum lív og heilsa eru í vanda.



# Skulu hava betri sømdir

**Aðalfundur í Føroya Arbeiðarafelag roynir at seta tiltøk í verk sum geva limunum eina betri sosiala trygd, tá ið illa vil til, ella táið teir koma upp í árini**

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*



*Tær sosialu skipanirnar hjá limunum í Føroya Arbeiðarafelag batna alsamt og aftur á hesum aðalfundinum vórðu ábøtur gjørdar*

Føroya Arbeiðarafelag hevur seinastu árini gjørt nógv fyri at bøta um sosialu trygdina hjá limum sínum. Nýggjasta tiltakið í so máta er eftirlønargrunnurin, sum fór at virka 1. januar.

Men á aðalfundinum hjá felagnum varð ásannað, at tað fara at ganga nógv ár, áðrenn grunnurin verður so mikið stórur, at hann verður førur fyri at veita limunum eina hampiliga eftirløn.

Men tað eru eisini aðrar loysnir og ein loysn er ein serlig eftirlønartrygging, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur.

Tað er ein trygging, sum eftir ætlan skuldi vera í gildi inntil eftirlønarskipanin fór at virka. Men nú hon er farin at virka, verður eftirlønartryggingin ikki avtikin kortini.

Aðalfundurin hjá Føroya Arbeiðarafelag samtykti nevniliga, at tryggingin skal halda fram.

Sostatt verður tað framvegis so, at teir limir í Føroya Arbeiðarafelag, sum røkka eftirlønaraldur, eisini fara at fáa eitt hampiligt útgjald frá Føroya Arbeiðarafelag, sum ger skiftið frá arbeiðslívinum til eftirlønarlívið lættari.

Treytin fyri at fáa hetta eftirlønargjaldið, er, at viðkomandi pensjonistur, hevur verið virkin limur í Føroya Arbeiðarafelag seinastu fimm árini, áðrenn hann ella hon, fara frá við eftirløn.

Ingeborg Vinther upplýsir eisini, at umhugsað verður at hækka tryggingarupphæddina, men støða verður ikki tikin til tað, fyrrenn seinni og tað fer eisini at kosta eyka.

## Eisini sjúkragrunn

Eftirlønarskipan og eftirlønartrygging, eru ikki einastu sosialu tiltøk hjá Føroya Arbeiðarafelag. Felagið hevur eisini ein sjúkragrunn, men Ingeborg Vinther hevur fatan av at tað eru alt ov fá, sum vita av honum, tí tað er ímillum nakað og onki, sum fer úr grunninum.

Men nú ætlar felagið sær at royna at fáa grunnin at virka betri.

Grunnurin veitir fíggjarligan styrk, tá ið limur í Føroya Arbeiðarafelag verður sjúkur. Hann veitir eisini avvarðandi fíggjarligan styrk, tá ið limur doyr.

Men hann veitir eisini limum í Føroya Arbeiðarafelag fíggjarligan stuðul, tá ið børn teirra verða álvarsliga sjúk og tað er neyðugt hjá foreldrunum at fara úr arbeiði fyri at vera um tey, eitt nú á sjúkrahúsi.

Samastundis, sum ætlanin er at upplýsa meiri um grunnin, hevur aðalfundurin hetta vikuskiftið samtykt at gera hann betri enn hann er.

Higartil hevur ikki borið til at fingið útgjald úr grunninum, fyrrenn ein hevur verið sjúkur í níggju mánaðir og tað ikki longur ber til at fáa dagpening. Men nú er samtykt, at tað skal bera til at fáa úr grunninum eftir sjúku í tríggjar mánaðir.

# Gera tað lættari hjá feløgunum

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*

Føroya Arbeiðarafelag er samansett av nógvum lokalfeløgum, sum øll hava hvør sínar lógir. Og tað kemur fyri, at tað ikki altíð er samsvar ímillum lógirnar hjá teimum ymsu feløgunum og lógunum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Men nú hevur stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag gjørt eitt uppskot um, hvussu lógirnar hjá feløgunum kunnu verða orðaðar fyri at fáa tær so eins sum gjørligt.

Samastundis er uppskot gjørt um, hvussu lógirnar fyri verkfallsgrunnarnar hjá teimum ymsu feløgunum kunnu orðast.

– Hetta er ætlað sum eitt amboð hjá nevndunum í lokalu feløgunum at hava, tá ið tær gera lógir og tað er sostatt ikki ein treyt, at tey lokalu feløgini fylgja teimum, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað kunnu sjálvandi vera serlig viðurskifti, sum gera seg galdandi í teimum ymsu økjun um sum krevur serligar orðing-ar.

Tó skal stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag altíð góðkenna lógirnar hjá einum lokalfelag, áðrenn tær kunnu setast í gildi.

# Ingeborg situr trygg

**Eftir 22 árum í formanssessinum hevur Ingeborg Vinther framvegis so stóran stuðul í Føroya Arbeiðarafelag, at í veruleikanum er onki ivamál um, hvør skal vera formaður felagsins**

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*



*Nevndin í Føroya Arbeiðarafelag er nú mannað soleiðis. Frá vinstru: Sunrid Vang úr Froðba, nevndarlimur, Karla Einarsson úr Runavík, nevndarlimur, Ingeborg Vinther úr Vági, formaður, Margretha Rasmussen úr Fuglafirði, nevndarlimur, Marius Clementsen av Sandi, nevndarlimur, Poul Juul Festirstein av Eiði, nevndarlimur og Georg Hansen úr Miðvági, næstformaður*

Limirnir í Føroya Arbeiðarafelag hava enn einaferð valt Ingeborg Vinther at standa á odda fyri felagnum.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, var eisini nevndarval. Hesuferð stóðu tríggir nevndarlimir fyri vali, Harry Benjaminsen úr Gøtu, Karla Einarsson úr Runavík og formaðurin sjálvur, Ingeborg Vinther úr Vági.

Ingeborg Vinther og Karla Einarsson vórðu afturvald, men Poul Juul Festirstein av Eiði varð valdur fyri Harry Benjaminssen.

Eykalimir í Føroya Arbeiðarafelag eru Ásmund Berg úr Skopun, Jógvan Páll Johansen úr Haldarsvík og Jan Nielsen úr Havn, sum umboðar S& K.

Síðani skuldi ein av nevndarlimunum veljast til formann og har var ongin ivi um, at Ingeborg Vinther skuldi halda fram sum formaður.

Hon fer sostatt nú undir sítt 23. ár sum formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Nevndin í Føroya Arbeiðarafelag er nú hendan: Ingeborg Vinther úr Vági er formaður og Georg Hansen úr Miðvági er næstformaður.Hinir nevndarlimirnir eru Karla Einarsson úr Runavík, Poul Juul Festirstein av Eiði Sunrid Vang úr Froðba, Margretha Rasmussen úr Fuglafirði og Marius Clementsen av Sandi.

## Umboðsráðið víðkað

Samstundis varð samtykt at víðka umboðsráðið hjá Føroya Arbeiðarafelag. Umboðsráðið er mannað við einum umboði fyri hvørt av teimum økjum, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur sersáttmálar við og nú eru 10 limir í umboðsráðnum.

Men summi øki hava hildið, at tey hava verið ov illa umboðað og tí hevur aðalfundurin hjá Føroya Arbeiðarafelag samtykt, at tey øki, sum hava meiri enn 200 limir, hereftir skulu hava tveir limir í umboðsráðnum, eitt nú S & K.

Fyrr hevur tað verið so, at Umboðsráðið hevur verið kallað saman til fundar eftir boðum frá stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag. Men nú er tann broyting gjørd, at nú kann eisini formaðurin í umboðsráðnum kalla ráðið saman.

Umboðsráðið er bindilið ímillum Føroya Arbeiðarafelag og økini, sum sersáttmálarnir fevna um og broytingin er gjørd, tí summi halda, at tað er nakað sjalvdan, at Umboðsráðið hittist.

Formaður í umboðsráðnum er Hans Jacob Jensen av Skála.

## 155 fólk

Aðalfundurin í Føroya Arbeiðarafelag hesuferð var tann fjølmentasti nakrantíð. Hvørt lokalfelag kann senda umboð á aðalfundin og hesuferð høvdu heili 155 fólk úr øllum landinum leitað sær á aðalfund og tað er væl meir enn vanligt, tí hesi síðstu árini hevur fundarfólkið ligið um 100 og gott tað.

Ingeborg Vinther heldur, at yvirhøvur er tað vaksandi áhugi fyri fakfelagsarbeiði, sum ger, at so nógv fólk koma á aðalfund.

Føroya Arbeiðarafelag ger eisini mangt og hvat fyri at økja um áhugan fyri felagnum.

Eitt er, at felagið hevur sett ymsar sosialar skipanir í verk fyri at bøta um korini hjá limunum.

Men felagið hevur eisini gjørt nógv fyri at halda skeið av ymsum slagi fyri limum, álitisfólkum og nevndarlimum, fyri at menna áhugan fyri fakfelagsarbeiðnum.

– Tað vísir seg, at tá í fólk hava verið á einum skeiði, vekir tað beinanvegin áhuga fyri at taka størri lut í fakfelagsarbeiðnum og at vera við á fleiri skeiðum, sigur Ingeborg Vinther.